VÁGA KOMMUNA

# Viðtøkur fyri foreldraráðini á dagstovnunum í Vága kommunu.

Sambært Løgtingslóg nr. 67 frá 10. Mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt við seinni broytingum.

## §1

**Endamál**

Endamál foreldraráðsins er at fremja áhugamál foreldranna á dagstovnum í Vága kommunu. Ráðið skal arbeiða jaligt fyri at styrkja um samstarvið millum heimið, stovnarnar og kommununa.

Foreldraráðið skal virkað fyri trivnaðinum millum børn, foreldur, starvsfólk og stovnarnar.

Foreldraráðið arbeiðir við yvirskipaðum málum, mannagongdum, tiltøkum o.ø, og skal nýtast sum hoyringspartur í viðkomandi málum, har avgerðir verða tiknar sum hava týdning fyri samstarv millum foreldur og stovn.

## §2

**Foreldraráðslimir**

Í ráðið kunnu veljast øll, sum hava børn á stovnunum. Undantikin eru tó starvsfólk innan barnaøkið í kommununi.

## §3

**Atkvøðurættur**

Foreldur ella avvarandi hava eina atkvøðu hvør.

## §4

**Ráðið**

Foreldraráðið er samansett av fimm limum, sum foreldrafundurin velur. Limirnir verða valdir fyri 2 ár í senn. Limur kann verða afturvaldur.

Tveir ella tríggir limir verða valdir líkatals ár, og ein ella tveir limir verða valdir ólíkatals ár.

Ráðið verður valt við vanligum atkvøðumeiriluta millum møttu foreldrini ella avvarandi. Fyri hvønn ráðslim verður valdur ein varalimur. Bæði kynini skulu verða umboðað.

Fer barn hjá ráðslimi av stovninum, tekur varalimur sæti í ráðnum.

Ráðið skipar seg sjálvt við formanni, næstformanni og skrivara. Skrivarin skrivar fundarfrásøgn, sum verður undirskriva av ráðslimum við fundarlok ella á fyrstkomandi ráðsfundi.

Gerðarbókin er ogn kommununnar.

§5

**Fundir**

Foreldraráðið kemur saman minst einaferð um ársfjóðringin. Fastir fundardagar verða avtalaðir á fyrsta fundi hvørt árið. Fundardagarnir verða skrivaðir í gerðarbókina. Eisini verða teir hongdir á uppslagstalvunar á stovnunum.

Foreldraráðið kann, um tørvur er á tí, bjóða leiðara við til onkran av føstu fundunum. Foreldraráðið gevur tá leiðara fundarboð.

Umboð fyri foreldraráðið, Vága kommunu og leiðarin hava minst ein fund við felags áhugamálum á einum av teimum føstu fundunum.

§6

**Foreldrafundur**

Foreldrafundurin er hægsti mynduleiki í øllum viðurskiftum ráðsins.

Foreldrafundur verður hildin á heysti einaferð um árið við hesi dagsskrá:

- Frásøgn frá leiðaranum um farna árið.
- Frásøgn frá foreldraráðnum.
- Val av limum og varalimum í foreldraráðið.
- Ymiskt.

Uppskot, sum skulu viðgerðast á foreldrafundi, skulu skrivliga vera ráðsformanninum í hendi seinast 14 dagar fyri fundin.

Foreldrafundurin er viðtøkuførur, tá minst helvtin av barnatalinum er umboðað.

Foreldrafundurin verður annars hildin, tá helvtin av ráðslimunum, leiðarin, minst 5 av foreldrunum ella kommunan ynskja tað.

Verður møguligur fyrilestur á skránni til árliga foreldrafundin, skulu foreldraráðini samstarva og leggja fundin saman, soleiðis at øll foreldur í kommununi hava møguleikan at koma til fyrilesturin. Skúlin kann í hesum føri veita høli til fundin.

§7

**Samsýning**

Samsýning verður latin limum, sum eru møttir á fundi sambært gerðarbók, eftir §2, stk. 2, punkt 1 í kunngerð nr. 92 frá 28. Juni 2013 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini. Samsýningin er ásett fyri í mesta lagi 1 fund um ársfjórðingin, foreldrafundin íroknað.

## §8

### Ábyrgd limanna

Hvør limur í ráðnum hevur tagnarskyldu um øll viðkomandi viðurskifti, sum hann/hon fær kunnleika um á ráðsfundi ella á annan hátt. Tagnarskyldan er eisini galdandi, eftir at limur er farin úr ráðnum. Hvør ráðslimur skal undirskriva eina váttan um tagnarskyldu.

Hesar viðtøkur eru samtyktar á kommunustýrisfundi tann 10. Juni 2015.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari